# Avgreiðslutíðir um jólini

27. og 28. desember 2007
eru avgreiðslutíðir okkara broyttar.

Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar hesar dagar frá kl. 10 til kl. 12.

Frá mikudegnum 2. januar 2008 verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 9 til kl. 15.




Sí annars www.almannastovan.fo

HTM | almannastovan

Tórshavn · Tinghúsvegur 14
Postrúm 3096 · 110 Tórshavn
Tel 35 35 70 · Faks 35 35 71

Norðoyggjar · Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296 · 700 Klaksvík
Tel 45 72 40 · Faks 45 72 41

Eysturoy · Heiðavegur
Postrúm 224 · 600 Saltangará
Tel 47 47 10 · Faks 47 47 11

Suðuroy · Sjógøta 3
Postrúm 58 · 800 Tvøroyri
Tel 35 35 60 · Faks 35 35 61

Hava tit minst til at goldið haldaragjaldið av Føroya besta blaði...!!!




Tórsgøta 1 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo
Sosialurin





## PRÍSVØKSTUR Í FOKUS

Aftaná tríggjar vikur við støðugt hækkandi kursum á evropiska partabrævamarknaðinum lækkaðu kursirnir 3,5% í farnu viku. Orsøkin var m.a. at brúkaraprísirnir í USA fyri november mánað hækkaðu 0,8% í mun til undanfarna mánað—ein árlig hækking á 4,3%. Tað er langt omanfyri málið hjá FED. Marknaðurin hevur væntað, at FED fer at lækka rentuna skjótt, men høgi prísvøksturin fær íleggjarar at óttast fyri, at rentulækkingin verður útsett hóast laku vakstratútlitini í amerikanska búskapinum. Ein rentulækking hevði annars stuðlað undir partabrøvum. Prísvakstrartølini fyri Europa hækkaðu eisini úr 3,0% til 3,1% árliga.

## DOLLARIN STYRKNAÐI NAKAÐ

Fríggjadagin styrknaði dollarin og liggur í dag á 5,19 mótvegis krónuni, sum er tað hægsta í skjótt 8 vikur. Her er tað eisini høgi prísvøksturin í USA, sum ger seg galdandi. Hesa vikuna undan jólum vænta vit ein tunnan marknað og tískil er møguleiki fyri lutfalsliga stórum sveiggjum í gjaldoyranum. Mest sannlíkt er, at dollarin fer at halda á at styrkna nakað komandi tvær vikurnar.

## STUTTU RENTURNAR HØGAR

1-mánaða danska rentan liggur í løtuni á 5,01% . Hetta er 1,18% hægri enn við ársbyrjan, tá hon var 3,83%. Óvissan, ið hevur valdað á fíggjarmarknaðunum tað mesta av hesum árinum, fer sannlíkt at halda fram inn í næsta ár. Hetta hevur við sær, at stuttu renturnar kunnu væntast framhaldandi høgar. Evropiski miðbankin fer sannlíkt eisini at hækka rentuna aftur tá sjógvarnir hava lagt seg og glið kemur á búskapin aftur seinni í komandi ári.

## HESA VIKUNA

Prísvøkstur og ídnaðarálit seta dám á ársins síðstu dagar. Hóast ring útlit verður spennandi at síggja nýggju tølini um bústaðarbygging í USA mánadagin. Mikudagin verður týskt ídnaðarálit kunngjørt, sum væntandi eisini verður lægri enn tað undanfarna, orsakað av eini sterkari evru og færri nýggjum ordrum til ídnaðin. Fríggjadagin kemur amerikanska prísvakstrartalið PCE.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1325,49 | -2,11% |
| Alheims partabrøv | 8056,55 | + 0,07% |
| Atlantic Petroleum | 1650,00 | -8,08% |
| Føroya Banki | 179,50 | -8,88% |
| Eik Banki | 488,00 | -6,15% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,66 | + 1,54% |
| USD | 518,14 | + 2,55% |
| JPY | 4,59 | -0,26% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK